Álit

í

løgtingsmáli nr. 80/2023: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um almenna heilsutrygd (Heilsutrygdarlógin) (Undantak fyri gjaldskyldu, afturgjaldsreglur, heimild til innheinting av skuld o.a. og nágreining av, hvussu tilskotið skal roknast, tá ið ein fyllir 18 ár og tá ið ein verður pensjónistur ella fyritíðarpensjónistur í tilskotstíðarskeiðinum)

Margit Stórá, landsstýriskvinna í heilsumálum, hevur lagt málið fram 7. mars 2024, og eftir 1. viðgerð tann 20. mars 2024 er tað beint Trivnaðarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 11. og 19. apríl og 2. mai 2024.

Undir viðgerðini av málinum hevur nevndin havt fund við áhugafelagið Antares, Føroya Fiskimannafelag, felagið Føroyskir Fiskimenn Uttanlands og landsstýriskvinnuna í heilsumálum, Margit Stórá.

Ein samd nevnd hevur hesar viðmerkingar:

Nevndin tekur sum heild undir við uppskotinum. Hvat viðvíkur heilsutrygdargjaldinum og møguligum endurgjaldi hjá teimum, ið hava goldið, áðrenn lógin kemur í gildi, hevur nevndin fingið upplýst frá landsstýriskvinnuni, at arbeitt verður við málinum, og at lógaruppskot verður lagt fyri Løgtingið eftir ólavsøku í ár.

Undir viðgerðini er komið fram, at TAKS hevur boðað Heilsumálaráðnum frá, at tað er ein avbjóðing fyri TAKS at seta uppskotið í gildi 1. juli 2024, hetta tí at undantak má verða fyri gjaldskyldu fyri eitt heilt skattaár.

Nevndin setir tískil fram soljóðandi

b r o y t i n g a r u p p s k o t

1. Í § 1, nr. 3 verður § 24, stk. 2, 2. pkt. strikað.

2. § 1, nr. 4 verður orðað soleiðis:
   "Í § 24 verður sum stk. 5 sett:
   "*Stk. 5*. Landsstýrisfólkið kann áseta nærri reglur um viðurskifti viðvíkjandi umsókn, um hvat ár og nær frá umsóknin skal vera galdandi fyri og um fráboðanarskyldu sambært stk. 2."

3. Í § 2, stk. 2 verður aftaná "2024" sett: ", og hevur virknað frá inntøkuárinum 2024"

<u>Viðmerkingar</u>
Um ein umsøkjari sostatt søkir um undantak frá heilsutrygdargjaldi t.d. tann 3. august 2024, hevur umsóknin virknað fyri inntøkuárið 2024.

Skotið er tí upp, at § 1, nr. 2-7 í lógaruppskotinum koma í gildi 1. juli 2024. Hetta soleiðis, at Heilsutrygd og TAKS fáa stundir at gera seg klár til at umsita skipanina við undantaki frá heilsutrygdargjaldi.

Sambært omanfyristandandi broyting kemur lógin í gildi 1. juli 2024, men hevur virknað frá inntøkuárinum 2024.

Við hesum viðmerkingum og broytingaruppskoti tekur Trivanaðarnevndin undir við málinum og mæli Løgtinginum at samtykkja uppskotið.

Trivnaðarnevndin, 6. mai 2024

Jørgen Niclasen formaður	Liljan Weihe næstforkvinna	Kaj Leo Holm Johannesen
Johan Dahl	Árni Skaale	Hans Jacob Thomsen
	Súsanna Bertholdsen	